# BILAR

SAMBAND
MAGNUS GUNNARSSON
MAGGI@SOSIALURIN.FO

## Bilradio útsett

*Av tí at Rás2 sendir frá fiskivinnuframsýningini Fish Expo 2009 hósdagin, er sendingin Bilradio útsett til í komandi viku.*

# Nýggjur Opel Astra í Frankfurt

**Ein heilt nýggjur Opel Astra verður sýndur fram á altóða bilaframsýningini í Frankfurt í september**

BILAR
*Magnus Gunnarsson*
*maggi@sosialurin*



*Nýggi Opel Astra við 5-hurðum verður sýndur fram á bilaframsýningini í Frankfurt í september*

Fyrstu myndirnar av nýggja Opel Astra vísa, at talan er um ein bil við sama designstíli sum Opel Insignia.

Nýggi Astra verður nakað størri enn forgangarin, og aksilfrástøðan er størri, soleiðis at bilurin eisini verður væl rúmligari.

Bilurin er teknaður og designaður á høvuðssætinum hjá Opel í Rüsselsheim í Týsklandi, har serliga nógv er gjørt burturúr at gera bilin aerodynamiskan við minst møguligari vindmótstøðu.

Í fyrstu atløgu vera ikki minni enn átta motorar at velja ímillum, bæði CDTI turbo dieselmotorar við common-rail multipoint innspræning og onkur nýggjur bensinmotorur verður eisini á skránni. Dieselmotorarnir fáast frá 95 til 160 hk, har allir hava partikulfiltur sum standard, og ein ecoFLEX útgáva við sera lágum CO2 útláti verður eisini at fáa.

Bensinmotorarnir fáast frá 100 til 180 hk. Ein nýggjur 1,4 bensinmotorur við turbo og 140 hk kemur ístaðin fyri núverandi 1,8 motorin. Allir motorarnir lúka stranga Euro5 normin fyri útlát.

Undirvognurin er uppbygdur eftir einum heilt nýggjum konsepti, soleiðis at bæði fjaðraskipan og koyrieginleikar vera á sera høgum støði.

Nýggi Opel Astra kemur á marknaðin um árskiftið 2009/2010.





*Astra hevur sama designstíl sum Opel Insignia*

# Allir bilar kunnu rusta

**Thomas Bull Enger frá Auson AB í Svøríki, sum framleiðir Mercasol rustverju, hevur undirvíst starvsfólkum í bilbransjuni um ymiskt nýtt innan rustviðgerð av bilum**

BILAR
*Magnus Gunnarsson*
*maggi@sosialurin*



*Marner við Skipá frá Føroya Oljusølu og Thomas Bull Enger frá Auson AB í Svøríki*

*Mynd: Magnus Gunnarsson*

Føroya Oljusøla við Marner við Skipá í Hoyvík hevði í vikuni vitjan av norska Thomas Bull Enger, sum býr í Norra, men arbeiðir fyri Auson AB í Svøríki, sum framleiðir Mercasol rustverju

Thomas hevur áður verið í Føroyum og kennir til føroysk viðurskifti. Hann sigur, at tað hevur stóran týdning í okkara veðurlag, at bilarnir eru væl rustviðgjørdir.

Thomas undirvísti starvsfólkum í bilbransjuni um ymiskt nýtt sum er komið fram í sambandi við rustviðgerð av bilum. Hann legði eisini dent á, at bileigarar sjálvir lesa hvat stendur í instruktiónsbókini um hvat garantiið dekkar. Hóast bilurin hevur 12 ára gjøgnumteringsgaranti, kann tað t.d standa í instruktiónsbókini, at garantiið ikki dekkar skaðar av salti, so eigarin hevur eisini ábyrgd av sínum bili hvat rusti viðvíkur.